## Skúlarnir niðurslitnir

**Skúlastjórarnir í Havn eru ikki heilt samdir við borgarstjóran Jan Christiansen og Heðin Mortensen um, at skúlaøkið verður raðfest høgt í Tórshavnar kommunu. Meira peningur átti at verið settur av til íløgur, tí skúlarnir í høvuðsstaðnum eru niðurslitnir, halda teir**

SKÚLAØKIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í tíðindunum í Útvarpi Føroya týskvøldið kom fram, at skúlastjórarnir á fólkaskúlunum í Havn meta, at stórur tørvur er á íløgum til skúlabygging í Havn, tí felags fyri flestu skúlarnar er, at teir eru niðurslitnir. Útvarpið hevði eina spurnarrundu millum skúlastjórarar í Havn um støðuna á skúlaøkinum, og flestu teirra vóru á einum máli um, at teir eru nøgdir við játtanina til rakstur, men á íløgusíðuni restar nógv í.

Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Jan Christiansen, og Heðin Mortensen hava fyrr í vikuni sagt, at teir halda, at skúlaøkið verður væl umsitið og raðfest høgt í kommununi.

Teirra fatan er eisini, at skúlastjórarnir í Havn eru samdir, men hetta er eftir øllum at døma ikki meir enn hálvur sannleikin. Skúlastjórarnir í Havn eru nøgdir rakstarjáttanina, men ikki íløgujáttanina.

Hølisviðurskiftini eru í fleiri førum ikki nøktandi, og felags fyri fleiri skúlar í Tórshavnar kommunu er at teir eru niðurslitnir, og stórur tørvur er á ábøtum, søgdu teir í Útvarpinum týskvøldið.

# Tey 18 ára gomlu sleppa aftur í dans

**18 ára gomul sleppa aftur á diskotek í Havn leygarkvøld. Aldursmarkið í Eclipse verður sett niður til 18 ár, og dansistaðið fer serliga at leggja seg eftir at spæla diskotekstónleik. Broytingin er millum annað gjørd eftir áheitanum frá foreldrum og miðnámsskúlanæmingum**

PLATFORM & ECLIPSE
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin*



*Loksins sleppa tey 18 ára gomlu aftur í dans í Havn. Eftir nógvar áheitanir frá foreldrum, næmingum á miðnámsskúlum og næmingaráðum í Havn, hava eigararnir á Platform, Eclipse og Café Natúr gjørt av at seta aldursmarkið í Eclipse niður til 18 ár.*
*Tilgjørd mynd*

Síðan í summar, hava tey 18 ára gomlu ikki havt nakran góðan, um tey eitt leygarkvøld hava ætlað sær á diskotek í Havn. Eftir at Club 20 lat aftur, hevur aldursmarkið til bæði Platform og nýggja staðið Eclipse verið 20 ár og eldri leygarkvøld. Platform hevur havt 20 árs aldursmark, meðan aldursmarkið hevur verið 21 ár fyri at sleppa inn á Eclipse.

Eftir sótu tey 18 ára gomlu, sum hvørki sluppu í Eclipse ella Platform.

### Aldursmarkið niður

Eftir nógvar áheitanir frá foreldrum, næmingum á miðnámsskúlum og næmingaráðum í Havn um eisini at geva teimum 18 ára gomlu innivist leygarkvøld, hevur felagið, Platform-Eclipse- Café Natúr, gjørt av at broyta málbólkin í Eclipse.

Aldursmarkið er sett niður til 18 ár, og dansistaðið fer serliga at leggja seg eftir at hava diskotekstónleik. Tiltøkini við live tónleiki í Eclipse verða færri í tali í framtíðini.

Platform fer at halda fram við live tónleiki, og aldursmarkið verður framhaldandi 20 ár. Teir tríggir, ið eiga bæði Platform og Eclipse siga, at endamálið við Platform er at hækka enn meir um tænastustøðið og støðið á live tónleikinum, so gestirnir yvir 20 ár fara at kenna seg væl á Platform.

Broytingarnar við Eclipse og Platform eru gjørdar við tí fyri eyga, at nakað verður bæði fyri eldru- og yngru gestirnar, tá tey fara í býin um vikuskiftið.

# Semja um Húsalánsgrunnin

**Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Bill Justinussen, sigur seg vænta, at hann hevur fullan politiskan stuðul í samgonguni til at fremja neyðugu broytingarnar við Húsalánsgrunninum, so at hesin verður almenna amboðið innan bústaðarbygging**

FRAMTÍÐIN HJÁ HÚSLÁNSGRUNNINUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Bill Justinussen sigur seg kenna á sær, at felags politiskur vilji er í samgonguni um at fremja neyðugu broytingarnar við Húsalánsgrunninum, hóast tingmenn góvu greitt til kennar undir aðalorðaskiftinum um alternativa bústaðarbygging, at teir ikki taka undir við ætlaninum hjá landsstýrismanninum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í samband við orðaskiftið um alternativa íbúðarbygging í Føroyum fyri góðum mánaði síðan, mælti arbeiðsbólkurin til, at Húsalánsgrunnurin skal í framtíðini gerast ein nógv virknari fíggingarstovnur til bústaðarbygging. Arbeiðsbólkurin mælti til í frágreiðingini, at lógin um Húsalánsgrunnin skal nútímansgerast, so hon samsvarar við endurskipanina av grunninum.

Á landsstýrisfundi týsdagin vóru flestu grunnar og stovnar undir landinum viðgjørdir. Talan var um ein samlaða viðgerð, har tað umrøtt, hvørjar felags linjur grunnarnir undir landinum skulu hava í framtíðini.

### Mótstøða

Undir aðalorðaskiftinum um alternativa bústaðarbygging kom greitt fram, at serliga Fólkaflokstinglimir og tinglimir úr Sambandsflokkinum tóku ikki undir við tilmælinum hjá arbeiðsbólkinum um at gera Húsalánsgrunnin til ein virknari fíggingarstovn til bústaðarbygging.

Grundgevingin var, at tinglirmirnar mettu, at tað almenna skuldi halda burtur frá bústaðarfígging, tí privatu peningastovnarnir høvdu nóg mikið av peningi at læna. Eingin orsøk var tískil til, at tað almenna skuldi upp í kappingina.

Bæði fólkaflokstingmaðurin, Jørgen Niclasen og tingmaðurin í sambandsflokkinum, Alfred Olsen vóru á einum máli um, at bústaðarfígging skal fara fram á einum fríum marknaði, har privatu fíggingarstovnar framhaldandi skulu kappast í fríari kapping.

### Semja

Hóast tinglimir vístu greitt undir aðalorðaskiftinum, at teir ikki taka undir við, at Húsalánsgrunnurin verður eitt alment amboð til bústaðarfígging, so er heilsumálaráðharrin, Bill Justinussen, ið hevur við til at gera uppskotið, sannførdur um, at politiska semja er í samgonguni um at fremja broytingar við Húsalánsgrunninum.

Bill Justinussen greiðir frá, at í løtuni arbeiða embætisfólk á heilsumálaráðnum við at broyta lógina um Húsalánsgrunnin.

Spurdur, um tað ikki kann gerast ein trupulleiki, at tinglimir hava givið til kennar, at teir eru ímóti uppskotinum, svarar Bill Justinussen, at mótstøðan er frá einstøkum tinglimum og ikki samlaðu flokkunum, og har afturat eru ætlaðu broytingar við Húsalánsgrunninum í tráð við samgonguskjali, so mótstøðuni ber hann ikki stórvegis ótta fyri.

Bill Justinussen torir ikki at siga ítøkiliga nær uppskotið verður lagt fyri tingið, men tað fer helst ikki at ganga rúm tíð, áðrenn uppskotið kemur í tingið



# Strandferðslan selir seinasta bussin

**Strandfaraskip Landsins hava lýst seinasta bussin til sølu. Bussførarin er sagdur úr starvi til 1. januar 2004**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*




*Bygdaleiðir hava í eini tvey ár verið riknar av privatum bussfeløgum, uttan flogleiðin, sum Strandferðslan sjálv hevur røkt. Men nú er seinasti bussurin hjá Strandferðsluni lýstur til sølu, og bussførarin uppsagdur. Um flogleiðin eisini verður boðin út, er ein politiskur spurningur, sigur fólkaflutningsleiðarin á Strandfaraskipum Landsins*

**Vágar:** Strandfaraskip Landsins lýsa tann seinasta av bussunum hjá stovninum til sølu. Førarin er sagdur upp at fara úr starvi á nýggjárinum, og síðan verður tað ein politisk avgerð, um flogrutan, har bussurin hevur koyrt, skal bjóðast út av nýggjum, sigur fólkaflutningsleiðarin á Strandferðsluni.

Tá Bygdaleiðir fyri góðum tveimum árum síðan vórðu bodnar út, varð flogleiðin verandi eftir hjá Strandferðsluni. Avgjørt varð tá, at hyggjast skuldi at, hvussu ferðingin fór at laga seg, tá Vágatunnilin varð tikin í nýtslu.

Ferðafólkatalið við bussinum minkaði munandi, og tað er ikki komið upp aftur enn, men tykist hava lagt seg í fasta legu, sigur Poul Jákup Thomsen, fólkaflutningsleiðari hjá Strandfaraskipum Landsins.

Busseigarar í Vágum, sum áhugaðir vóru í at bjóða upp á hesa leiðina, meta, at nú bussurin verður seldur, eigur leiðin at verða boðin út av nýggjum.

– Tað er ein politiskur spurningur, um tað skal gerast, ella um okkurt annað verður gjørt, sigur Poul Jákup Thomsen. Hann sigur, at Strandferðslan hevur boðað Vinnumálaráðnum frá støðuni, sum nú er, og so má ein avgerð koma haðani, um boðið verður út, ella onnur loysn verður vald.

Fólk, sum ferðast á leiðini, hava lagt merki til, at vanligi bussførarin ikki koyrir í løtuni, men at annar bussur er komin á leiðina, hóast ikki er boðið út.

Poul Jákup Thomsen sigur, at tað kemst av, at bussførarin, sum er sagdur úr starvi, heldur frí í løtuni, og meðan tað er, røkir annar bussur, sum dagliga koyrir á aðrari rutu, eisini tann partin, sum bussurin hjá Strandferðsluni vanliga koyrir.

# Tvær kærur um leiðaran á Fiskiveiðieftirlitinum

**Fiskimálaráðið hevur fingið tvær kærur frá maskinmonnum, sum hava søkt starv við vaktar- og bjargingarskipunum, men sum ikki eru settir í starv, háost teir fyrr hava verið við skipunum**

STARVSSETAN
*Edvard Joensen*



*Maskinmenninir á vaktar- og bjargingarskipunum søgdu seg í felag úr starvi, og leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum tók uppsagnirnar til eftirtektar. Tá søkt varð eftir fólki av nýggjum, fingu ikki allir maskinmenninir, sum høvdu sagt upp, starvið aftur, og tað hevur nú havt við sær, at tveir teirra hava kært leiðaran á Fiskiveiðieftirlitinum til Fiskimálaráðið*

Landsstýrismaðurin við fiskivinnumálum hevur fingið vær kærur um leiðaran á Fiskiveiðieftirlitinum. Onnur kæran er rættiliga umfatandi, sigur landsstýrismaðurin.

Málið um maskinmenninar á Fiskiveiðieftirlitinum, sum ikki vórðu settir aftur í starv, eftir at teir høvdu sagt upp í felag, er nú sum kæra komið á borðið hjá landsstýrismanninum við fiskivinnumálum, sum hevur fingið tvær kærur um leiðaran á Fiskiveiðieftirlitinum.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður váttar fyri Sosialinum, at ein kæra, sum er rættiliga umfatandi, ið er dagfest 10. november, er komin til hansara.

Hin kæran var komin í húsið mikumorgunin, sigur Jacob Vestergaard, men hann hevði ikki havt høvi at lisið hana, tá Sosialurin tosaði við hann fyrapartin mikudagin. Báðar kærurnar eru frá maskinmonnum, sum ikki eru settir aftur í starv, hóast teir hava søkt.

Sosialurin hevur tosað við mannin, sum hevur sent ta fyrru kæruna, ið sambært manninum sjálvum er rættiliga umfatandi og viðgerð viðurskifti, ið eftir hansara tykki eru á markinum til lógarbrot. Hann sigur, at hesi mál eru uppløgd at leggja fyri løgtingsins umboðsmann. Tann kæran er 16 blaðsíður til longdar.

Maðurin ynskir fyribils ikki at verða navnnevndur, men Sosialurin kennir samleika hansara.

Maðurin sigur við Sosialin, at hann í høvuðsheitinum ger fýra viðurskifti galdandi. Hvat orðarætt stendur í kæruni, hevur hann ikki hug upplýsa, meðan málið er til viðgerðar.

Kærarin hevur kært til Fiskimálarðáðið um, at leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum ikki hevur givið honum skjalainnlit, sum hann sambært fyrisitingarlógini og fyrisitingarrætti metir seg at hava rætt til.

Kærarin sigur í øðrum lagi, at leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum í málum, hann hevur viðgjørt, hevur verið ógegnigur, men hóast tað hevur havt avgerandi leiklut í setan av av limum í setanarbólk, sum skal viðgera umsóknir, umframt endaligu avgerðini um, hvør skuldi setast í starv.

Víðari verður kært um, at leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum onga veruliga grundgeving hevur givið fyri, at kærarin ikki hevur fingið tey størv, hann hevur søkt, hóast hann hevur biðið um tað.

Í fjórða lagi sigur kærarin, at greiðar ábendingar eru um, at ósakligar grundir eru brúktar, tá avgerð er tikin um, hvør skuldi setast í starv.

Maðurin, sum hevur kært leiðaran á Fiskiveiðieftirlitinum til Fiskimálaráðið, sigur við Sosialin, at tey viðurskifti, hann hevur gjørt vart við, eru so mikið álvarslig, at hann kendi seg noyddan at taka hetta stigið. Hvat stendur í kæruni , sum ein fyrrverandi starvsfelagi, sambært landsstýrismanninum við fiskivinnumálum eisini hevur sent fiskimálaráðnum veit hann ikki at siga, men metir, at tað man vera talan um somu viðurskifti.

Hesi viðurskiftini eru so álvarsom, at tað heilt greitt eisini er eitt mál, ið Løgtingsins umboðsmaður átti at komið uppí. Men um hann fer at senda málið tann vegin, hevur hann ikki gjørt av enn, sigur kelda okkara við Sosialin.

Leiðarin á Fiskiveiðieftirlitinum sigur, at hann enn ikki hevur sæð kærurnar, tíansheldur viðgjørt tær, og kann tí ikki gera viðmerkingar til málið, sum tað stendur í løtuni.